## DAGSINS MEINING

# Brúk fyri brúkarastovni

Fjølmiðlar hava av álvara sett kikaran á brúkaramál, eftir at norðurlendskur brúakarafundur var í Føroyum seinasta vikuskiftið. Spell, at fjølmiðlar ikki í størri mun viðgjørdu hesi viðurskifti, sum hava týdning fyri Karina og Marina og Hanus og Janus, tá Javnaðarflokkurin í seinastu tingsetu legði fram uppskot at stovna ein brúkarastovn.

Tá var nærum tøgn um uppskotið og hugsanirnar aftan fyri tað sera væl fyrireikaða uppskotið, sum fyrst og fremst fyrrverandi tingmaðurin í Norðurstreymoy, Hans Pauli Strøm, hevði æruna fyri. Men nú hevur hann onkursvegna dugað betur at selt hesa vøruna, sum næstan kann kallast neyðsynjarvøra í okkara brúkarasamfelag.

Orðaskiftið í sjónvarpinum vísti bara einaferð afturat, at tá tað snýr seg at verja mál og rættindini hjá brúkarunum, so er Fólkaflokkurin framvegis á steinaldarstigi. At hann enn ikki er komin á jarnaldarstig, avdúkaði orðaskifti millum Hans Paula Strøm og landsstýrismannin Bjarna Djurholm.

Hevði talan hinvegin verið um at verja rætindini hjá borgarunum ella skattagjaldarunum,og at seta ein skattgjaldaraumboðsmann, so hevði Fólkaflokkurin óivað verið skjótur á barrikadunum. (Tað hevur hann annars ikki verið, síðani Fólkaflokkurin legði fram uppskot um at beina NATO-støðina og hermenninar í Mjørkadali av landinum fyri einum 40 árum síðani)!!!

Sambært Bjarna Djurholm kunnu brúkari og seljari orðna trætur sínámillum, uttan hjálp frá brúkarastovni ella brúkaraumboðsmanni. Tað er møguligt, at Bjarni sum kendur politikkari kann loysa slíkar ósemjur. Tað sama er galdandi fyri tey meira ella minni kendu andlitini. Men at Karin og Marin kunnu koma í trupulleikar, sum ikki verða loystir sínámillum, avdúkaði útvarpstíðindi um brúkaraviðurskifti hóskvøldið. Bara ífjør hevði rættarhjálpin viðgjørt 23 brúkaramál. Talan er um mál líka frá dustsúgvarakeypi til bilakeyp!

Einaferð høvdu vit ein Tjóðveldisflokk, sum hevði aðrar hugsjónir enn ta einu, sum hann í dag hevur start seg blindan í. Hann hevði ein tilvitandi framherja, tá tað snúði seg um mál, viðurskifti og umstøður hjá tí vanliga fólkinum. Saman við Javnaðarflokkinum kundi hann fremja mál til frama fyri vanliga fólkið. Men atkvøddi Tjóðveldisflokkurin fyri uppskotinum um ein brúkarastovn?

Javnaðarflokurin eigur at koma burtur úr tí “koma”, hann hevur verið í, síðani hann ikki fekk samráðst seg fram til at verða ein flokkur í landssins stýri. Flokkurin eigur at leggja fram uppskotið um brúkarastovn. Kanska í meira átuligum hami. Tá fáa vit at síggja, um hann framvegis stendur einsamallur at verja áhugamálini hjá vanliga føroyinginum. Ella um Grímur á Skóg er vaknaður!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kommunurnar hava ábyrgdina av hølum og amboðum í fólkaskúlanum

**Tað er júst, sum Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag sigur. Tað eru kommunurnar og Mentamálaráðið, sum eiga at loysa savnsrøktarmálið**



**Elsa Birgitta P. Petersen**

Føroya Lærarafelag hevur onga ætlan um at samráðast við kommunurnar. Føroya Lærarafelag samráðist bara við landsmyndugleikarnar.

Men Føroya Lærarafelag tilskilar sær rætt til at vísa á tað órímuliga í, at undirvísingin á teimum smærri skúlunum í Føroyum er skerd munandi av berari tvørheit.

Føroya Lærarafelag vil eisini kunna foreldrini í hesum kommunum um, at nú Føroya Kommunufelag noktar limakommununum at gjalda sína helvt fyri savnsrøktina, verður úrslitið tað, at børnini hjá teimum ikki fáa eina fullgóða undirvísing.

Formaðurin í Føroya Kommunufelag sigur, at tað snýr seg ikki um pengar, men um eitt prinsipp.

Hevur formaðurin í Føroya Kommunufelag greitt foreldrunum í kommununum frá, at tey við landsskattinum gjalda fyri, at børnini í teimum størru kommununum fáa eina nógv betur skúlagongd enn teirra egnu?

Hevur hann greitt borgarunum í kommununum í Føroya Kommunufelag frá, at tað liggur ein upphædd av pengum og bíðar eftir, at grønt ljós verður givið fyri, at fólk kunnu fara í gongd við at røkja amboð og søvn í skúlunum, sum teir, borgararnir, hava rindað nógvar pengar fyri?

Hevur hann greitt borgarunum frá, at hesi søvn og amboð nú liggja í órøkt?

Um tað bara snýr seg um eitt prinsipp, hví gevur Føroya Kommunufelag so ikki kommununum í felagnum boð um at fáa fólk uttanfyri skúlan at røkja søvnini og amboðini?

Føroya Lærarafelag veit hví. Tað er tí, at tað hevði kostað nógv meira at fingið handverkarar at gjørt hetta arbeiðið fyri tímaløn.

So verður ført fram, at kommunurnar ikki gjalda læraralønir. Tað skulu tær heldur ikki. Landið rindar lærarum løn fyri at undirvísa.

Løgreglumenn verða løntir fyri teirra arbeiði av statinum. Tey, sum arbeiða í Føroya Banka, fáa løn frá Føroya Banka o.s.fr.

Men av og á er onkur lærari, løgreglumaður ella bankamaður eisini í starvi hjá kommununum. Til dømis er onkur bygdaráðsformaður, situr í skúlastýri, í barnavernd ella okkurt annað. Tá fáa hesi fólk eina ávísa upphædd fyri hetta arbeiði alt eftir, hvussu nógvar tímar tey arbeiða hjá kommununi.

Tá kann mann ikki siga, at kommunan rindar hesum fólki løgregluløn ella læraraløn. Tá er tað løn fyri kommunalt arbeiði. Soleiðis er tað eisini, tá rindað verður fyri savnsrøkt. Hvør tað so er, sum røkir skúlans amboð, eigur hann at fáa løn fyri hetta arbeiði. Um tað er ein lærari, er tað ikki læraraløn, men løn fyri kommunalt arbeiði, hann ella hon fær.

Nakað annað er so, at skúlaverkið í kommununi, sum Jacob Vestergaard er formaður fyri, hevur ikki tað stóra av søvnum ella amboðum. Tí verður undirvísingin ikki darvað í so stóran mun, sum í hinum skúlunum, sum Føroya Kommunufelag varðar av. So Jacob Vestergaard kann sum foreldur vera líkaglaður.

Skulu næmingarnir t.d. í Vestmanna, á Toftum, í Nólsoy, á Eiði svíða fyri tað?

Føroya Lærarafelag er kunnað um, at fleiri kommunustýrir í Føroya Kommunufelag høvdu gjørt av at rinda fyri savnsrøkt á teirra skúlum eftir semjuni millum Mentamálaráðið, Føroya Lærarafelag og Kommunusamskipan Føroya.

Spell at tørvandi ábyrgdarkensla enn einaferð fekk sett fót fyri hesum.

Annars ein rættleiðing til samrøðuna við Jacob Vestergaard. Hann sigur, at Fíggjarmálastýrið betalir kt-vørðunum fyri røktina av teldunum.

Hetta er bert partvíst rætt. Føroya Lærarafelag fekk við samráðingum hildið fast við, at eitt sindur av røkt verður goldið av Fíggjarmálastýrinum, meðan bróðurparturin av tí, sum kt-vørðirnir fáa er fyri námsfrøðiligar uppgávur: vegleiðing av næmingum og lærarum. Her skal kanska úrslitið av kt-semjuni standa.

Røkt út yvir hesa tíðina, eru kommunurnar noyddar at gera uppá rokning. Tað verður dýrt!!!!

# Nýggir dýrir bilar



**Øssur Winthereig, tíðindastjóri**
*Sjónvarp Føroya*

Stjórin hjá Wenzel ger í lesarabrævi viðmerkingar til tíðindini í Degi og Viku um útsøluprísin á nýggjum bilum í Føroyum.

Dagur og Vika hevur víst á tvær sannroyndir:

Tað ber til sjálvur at bíleggja sær ein nýggjan bil úr Danmark og spara millum 20.000 og 50.000 krónur í mun til lýstu útsøluprísirnar.

Hetta er ein upplýsing, sum kann hava týdning fyri nógvar føroyingar. Í øðrum lagi varð víst á í Degi og Viku, at hóast avgjøldini á nýggjar persónsbilar eru munandi lækkað og eru nógv lægri enn í Danmark, so sæst hesin munurin ikki stórvegis aftur í útsøluprísinum av nýggjum bilum. Ein av grundunum er, at føroysku bilasølurnar taka størri bruttovinning enn danskar, tá nýggir bilar verða handlaðir.

Hetta var høvuðsinnihaldið í tíðindunum um prísirnar á nýggjum bilum.

At brúktir bilar innganga í handlar broytir einki upp á støðuna, sum tíðindini í Degi og Viku hava lýst hana. Men kanska er orsøkin til høgu prísirnar, at bilasølurnar í lýstu útsøluprísunum leggja so mikið nógv upp fyri, at ráð verður at geva sera góðan prís fyri ein brúktan bil í býti.

Men tann spurningurin er ikki enn viðgjørdur í tíðindasendingunum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# YVIRLÝSING

til frama fyri rættindi teirra samkyndu og mótmæli móti samanvavstri av átrúnaði og politikki

Undirritaðu vilja við hesum vísa á, at vit treytaleyst taka undir við einum lógaruppskoti um skrásett parlag fyri samkynd í Føroyum.

Øll hini Norðurlondini hava samtykt eina slíka lóg, og í øllum vesturheiminum verður í hesum árum arbeitt fyri at bøta um korini hjá ymiskum minnilutum - eitt nú teimum samkyndu.

Vit ásanna, at tey samkyndu í Føroyum alt ov leingi hava verið ein minniluti, sum hevur fingið eina mannminkandi viðferð í tí føroyska samfelagnum. Tey samkyndu hava ikki kunnað vart seg fyri mismuni og happing og hava eisini ofta verið fyri loyniligum hatursálopum.

Samkyndir føroyingar hava tí verið noyddir at flyta av landinum fyri at sleppa at liva eina virðiliga tilveru.

Hetta er ein stór skerjing í frælsinum hjá teimum samkyndu og ikki minst hjá familjum teirra - heilt vanligum føroyskum familjum - sum hava "mist" síni samkyndu børn.

Tey samkyndu, sum av ymiskum orsøkum ikki hava megnað at funnið sær friðskjól uttanlands, hava livað í Føroyum undir støðugari hóttan og niðurgering. Hetta kann als ikki góðtakast í einum siviliseraðum og demokratiskum samfelagi, sum byggir á humanistiska siðvenju.

Í kjakinum um eina møguliga lóg um skrásett parlag hava átrúnaðarligir bólkar ført tað sjónarmið fram, at átrúnaðarligar skriftir skulu vera grundarlagið undir lóggávuni í Føroyum. Hetta sjónarmiðið hevur verið brúkt sum grundgeving fyri at forða fyri einari lóg um skrásett parlag fyri samkynd.

Vit halda tað hava stóran týdning, at Føroyar eins og øll hini Norðurlondini er eitt nýmótans, demokratiskt og sekulariserað samfelag við trúarfrælsi og eisini frælsi til ikki at vera trúgvandi. Tí mótmæla vit harðliga, at ávísar átrúnaðarligar skriftir og tulkingar skulu vera grundarlag undir landsins lóggávu.

Aina Leitisstein Knudsen
Áki Davidsen
Áki Eyðinsson
Allan Dalsgarð
Anna Kirstin Thomsen
Andras Mortensen
Andras Róin
Andrass Skaalum
Andrea Johansen
Angelica Gregoriussen
Anita Bringsberg
Anker Eli Petersen
Ann Ellefsen
Anna Dam
Anna Johannesen
Anna Maria Fossaa
Anna Maria Troest
Anna S. Olsen
Anna Sofía Restorff
Anna Thomsen
Anni á Hædd
Annika Antoniussen
Annika Brimheim
Annika Gregoriussen
Annika Hoydal
Annika Sølvará
Annika Wardum Joensen
Armgarð Weihe
Árni Dahl
Arnold Ludvig
Ásmundur Guðjónsson
Ása Andreasen
Astrid MacDonald
Atli P. Dam
Augusta Mikkelsen
Axel Nolsøe
Barbara Berg
Barbara Christophersen
Beinta Andresen
Beinta Árnadóttir Gregersen
Beinta Dam
Beinta Ziska Nielsen
Bergljót av Skarði
Bergljót Debes Hentze
Bergtóra Høgnadóttir Joensen
Bergur Dam
Birgir Djurhuus
Birgit Debess
Birna Mørkøre
Bjarni Johansen
Bjarni Richardt-Mortensen
Bjørg Joensen
Bjørg Róin
Bjørt Samuelsen
Brynhild Høgnadóttir
Brynhild Thomsen
Bogi Dánialson Davidsen
Bogi Jacobsen
Bo Magnussen
Børge Egholm
Carl Jóhan Jensen
Christian Kruse
Claus Reistrup
Dagfinnur Hammer
Dagny Joensen
Dánial Pauli Davidsen
Dánjal Petur Højgaard
Dennis Holm
Durita Dam
Durita Joensen
Døgg Paturssn
Ebba Sofia Kruse
Edith Dahl
Edvard í Skorini Joensen
Eirikur Lindenskov
Eivindur í Gongini
Elin Egholm Rossander
Elin Heinesen
Elin Súsanna Jacobsen
Elsa Thomsen
Elsebeth Andreassen
Erland Viberg Joensen
Erling Eidesgaard
Erling Isholm
Eyð B. Jacobsen
Eyðfinn Jensen
Eyðun Andreassen
Eyðun Hentze Højgaard
Eyðun Jensen
Eyðun Nolsøe
Fanny av Hamri
Finnbjørn Olsen
Finnur Hansen
Finnur Joensen
Flóvin Eidesgaard
Fróði Fjallstein
Fróði Holm Knudsen
Gestur Hovgaard
Gisleyg Holm
Guðrun Hammer
Gulla Øregaard
Gunnar Holm Jacobsen
Gunnar Hoydal
Gunnar Djurhuus
Gunnleivur Dalsgarð
Gutti Winther
Grækaris D.Magnussen
Halla Nolsøe Poulsen
Hallur Thomsen
Hanna Jacobsen
Hanna Joensen
Hanne Jacobsen
Hans Andrias Sølvará
Hans Andrias M. Joensen
Hansina Iversen
Hans Pauli Strøm
Hans Petur í Brekkunum
Heidi Gásadal
Heidi Poulsen
Heini E. Egholm
Heini Samuelsen
Helena Debes Højgaard
Hendrik Dahl
Henny Egholm
Henny á Líknargøtu
Heri Joensen
Heri Kragesteen
Heri Mørkøre
Herluf Lützen
Herluf Sørensen
Hermann Oskarsson
Hjørdis Heindriksdóttir
Hjørdis Johansen
Hugin Eide
Høgni Debes Joensen
Høgni Djurhuus
Høgni Egholm Magnussen
Høgni Mohr
Høgni Rasmussen
Inga M. Arge
Inger Flø Jørgensen
Ingi Rasmussen
Ingibjørg Egholm
Ingrid Jacobsen
Ingrið Sondum
Ingun Askham
Ingun í Skrivarastovu
Ingun Ziska Nielsen
Ingvør Nolsøe
Ivy Hansen
Jacob Nielsen
Jákup Poulsen
Jákup Veyhe
Jákup Sørensen
James Olsen
Jan Müller
Jane Hoydal
Jannie Bjørgvin
Jeanette Ellefsen Blåsvær
Jenny C. Petersen
Jens Nielsen
Jens Pauli Heinesen
Jensina Olsen
Jóannes Dalsgaard
Jóannes Dalsgarð
Jóannes Petersen
Jóannes Østerø
Jógvan Bærentsen
Jógvan Isaksen
Johan Christian Ziska Nielsen
Jóhann Mortensen
Jóhanna Olsen
John Johannesen
Jón Henriksen
Jón Mortensen
Jóna Dalsgarð
Jóna Jiménez
Jóna Olsen
Jónas Bloch Danielsen
Jónrit Nielsen
Jórun í Dali
Julianna Klett
Kaj Alstrup
Kári Árting
Kári Jacobsen
Kári Mortensen
Karin Egholm
Karin J. Leitisstein Knudsen
Karin Kjølbro
Karl Johan Fossaa
Kate Sanderson
Katrin D. Apol
Katrin Holm
Katrin Jacobsen
Katrin Næs
Katrin Ottarsdóttir
Kim Simonsen
Kirsten Brix
Kitty May Ellefsen
Kjartan Hoydal
Kjartan Kristiansen
Klæmint Olsen
Knud Steinø
Kristian Blak
Kristianna Winther Poulsen
Kristina Hansen
Kristina Ottosdóttir
Kristina Samuelsen
Kurt Madsen
Laila Jacobsen
Laura Joensen
Leif Láadal
Leivur Thomsen
Lena Nolsøe
Lena Reinert
Leon Smith
Lis Samuelsen
Magnus Egholm
Malan Egholm
Malan Johannesen
Malan Marnersdóttir
Malan Thomsen
Margrith Simonsen
Marianna Andreassen
Marianna Dahl
Marita Rasmussen
Marita Weihe
Marjun Dalsgaard
Marjun Patursson
Marna Jakobsen
Martin Nolsøe Simonsen
Martin Næs
Mary Ann Hansen
Mathea Hilduberg
Maud Heinesen
Maud Magnussen
Meduna Dalsgaard
Mikkjal Helmsdal
Niclas Thorsteinsson
Nicolina F. Skaalum
Niels Arge Galán
Niels Juel Arge
Niels Uni Dam
Nina Brockie
Oddfríður Marni Rasmussen
Oddvá Nattestad
Ólavur Olsen
Óli Hansen
Ole Nielsen
Oluffa á Høvdanum
Óluva Klettskarð
Ottar Schrøter Holm
Ova
Páll Danielsen
Páll Nolsøe
Per á Hædd
Pernille Olsen
Peter Østergaard
Petur Suni Lindenskov
Peturbjørg Jensen
Petur Slyne
Poul Davidsen
Poul Geert Hansen
Poula Simonsen
Ragna Maja Kruse
Ragnhild Olsen
Rakul Guðjónsson
Rakel Helmsdal
Randi Holm
Randi Jacobsen
Randi Meitil
Randi Mohr
Rani Nolsøe
Rigmor Dam
Rói á Rógvu Joensen
Rói Egholm
Rói Henriksen
Rolf Guttesen
Rúnar Reistrup
Rúni Petersen
Sámal Matras Kristiansen
Selma Ellingsgaard
Sigmund Poulsen
Signar Dam
Sigrun Joensen
Sigrun Samuelsen
Siri Eysturoy
Sissal Kj. Kristiansen
Sjúrður Johannesen
Sólrun Jacobæus
Sólrun Michelsen
Sólvá Dam
Sólveig Rove
Sonja Sumberg
Sonne Smith
Steinbjørn B. Jacobsen
Steintór Rasmussen
Súni Egholm
Súsanna Danielsen
Svanna Hanusardóttir
Terji Messell
Teitur Lassen
Terji Rasmussen
Thurid Samró
Tórður Jóansson
Torleivur Hoydal
Tór Verland Johansen
Tróndur Bogason Hansen
Trygvi Jacobsen
Trygvi Restorff í Brekkunum
Turið Debes Hentze
Turið Kjølbro
Turið Sigurðardóttir
Ulla Stenberg
Unn Jakobsen
Una Joensen
Uni Leitisstein Hansen
Vár í Ólavsstovu
Vár Jacobsen
Vónbjørt Svabo
Winny í Pætursastovu
Zakaris Svabo Hansen
Øssur Winthereig

# Uppspuni í Oyggjatíðindum



**Poul Geert Hansen, Sjúkrahússtjóri**

Á forsíðuni í Oyggjatíðindum í gjár 18. september hevur blaðið “avdúkað”, at persónar í leiðsluni á Landssjúkrahúsinum hava luttikið á kostnaðarmiklum yvirlivilsisskeiði hjá Carsten Mørch. Hetta er tann reini uppspuni og hevur einki við veruleikan at gera.

Landssjúkrahúsið er ein stórur stovnur, og leysatíðindi kunnu skjótt fáa stórar dimensjónir. Tí er týdningarmikið at rætta hesa søguna beinanvegin.

Tað er umráðandi fyri Landssjúkrahúsið, at leiðsluuppgávan verður tikin í álvara. Sjúkrahúsleiðslan hevur tí sett sær sum mál at menna leiðslurnar innan tey ymsu økini. Sum ein íblástur til hetta var Carten Mørch í endanum av mai mánaði og helt ein fyrilestur í nakrar tímar fyri leiðslubólkinum. Tað var eitt væleydað tiltak, og leiðslan fekk góðan íblástur í arbeiðinum at menna Landssjúkrahúsið - og tað var alt.